# Ein ferð til Havnar við Smyril undir krígnum

HUGLEIÐING
*Elin Mortensen*



*Elin Mortensen*

**Nú enn ein Smyril kemur til Føroya, rennur mær í hug ein ferð, eg gjørdi við Smirli til Havnar undir krígnum**

Flogfør høvdu søkt at Smyrli fleiri ferðir, men tíbetur hevði eingin skaði verið, bumburnar raktu ikki málið. Nógv óttaðust at fara til Havnar, nú tað var vorðið so vandamikið, men sjálvandi, fólk noyddust ofta at fara neyðsynjarørindi.

Soleiðis hjá mær einaferð. Hóast eingin sjóhetja, mátti eg leggja á bláman. Her var einki at gera. Smirl fór norður í ovurmorgin. Tað var heppið, tí nú sigldi hann eftir vetrarferðaætlanini, annanhvønn dag norður og annahvønn dag suður.

Eg fór frá húsum, tá ið Smirl ýldi aðru ferð. Tað var ikki so langt at ganga, so eg var í góðari tíð.

Tá ið eg eri komin hálva leið, rennur mær kalt niður eftir baki! Loft-ávaring! Á, hatta andskræmiliga ljóðið, sum fór gjøgnum mønu og merg og loypti hvøkk á.

Eg fór at renna, men ikki gekk skjótt hjá mær við kufferti í hond. Mær eydnaðist tó í øllum góðum at koma inn um í skýlið hjá Steintóri. Har var nærum fullsett av fólki. Nú var bara at seta seg at bíða. Eg sat og hugsaði. Skuldi eg fara í morgun, ella ikki! Jú, eg fari. Eingin sleppur undan lagnuni. Eg hugsi um mammu mína, sum fór til Danmark á hospital við myrkum skipi, tá ið kríggið var brostið á.

Vit sótu ikki leingi í skýlinum henda morgun. Skjótt varð avblást, »Falskur alarmur«, søgdu tey.

Nú var at skunda sær, at Smyril ikki sigldi undan. Steintór, sum altíð var beinasamur, bar kuffertið hjá mær. Hann fór eisini til Havnar. Heilt fitt av fólki var við henda morgunin. Veðrið var gott, stilli og sól.



*Glað andlit, nú sloppið varð undan fíggindanum*

»Góð flúgvilíkindi í morgun«, læt í einum manni.

»Halt gákin til á tær«, hvesti kokkurin, sum beint tá streyk framvið. Hann visti av royndum hvat, ið væntast kundi í slíkum góðum veðri.

Tá ið Smiril er komin norður um Lítlu Dímun, hoyrast róp: »Hyggið, hyggið, eitt flogfar«!.

Og í somu løtu ýlir skipslúðurin at boða frá, hvat, ið var á vási. Alt ferðafólkið, sum er á dekkinum, loypur yvir í tað borðið, har flogfarið sæst. Enn er tað langt burturi, bara ein prikkur á himmalinum, men hesin prikkurin verður alsamt størri og nærkast eisini.

ER tað vinur, ella fíggindi?

Ein ring løta at standa her og eygleiða hesa hóttan, sum skjótt er beint uppi yvir okkum. Andlit eru bleik, nevar knýtast og knúgvar hvítna. Hvussu nú leikur ferð?

Nú kemur ein av manningini rennandi og biður ferðafólkið fara av dekkinum. »Latið tykkum í bjargingarvestin beinan vegin«, sigur hann.

Vit verða beind inn í salónirnar, og hurðarnar verða afturlatnar. Tað kennist øgiliga kvalið. Onkur við svíma, og grátur og venan hoyrist. Seinasta løtan er komin, tað ivast vit ikki í. Einasta vónin er, at teir ikki raka, tað má verða okkara bjarging.

Nú er flogfarið beint uppi yvir okkum, tað hoyra vit. Nervar eru á tambi, nógvir tankar treingja á, hendur eru samanlagdar. Sleppa vit við lívinum?

Og … vit hvøkka við!

»All clear! All clear!« boðar lúðurin frá.

Hurðarnar verða skræddar upp, og øll tysja út á dekkið at hyggja. Gud havi lov, vinur var tað. Eitt Catalina flogfar! Frøin var stór. Onkur veittraði. Hetta høvdu vit ikki væntað, at so gott fór at spyrjast burturúr.

Kokkurin fór at gera kaffi, og nú varð prátað og flent í góðum hýri um alt skipið.

Steintór kom at bera okkum kaffi. Tað trongdu vit til, helt hann, oman á skelkin.

»Hevði tað bara verið mjørki, tá ið vit fara suður aftur«, læt í eini konu.

Tað var so svart sum í pottinum, tá ið eg fór suður aftur um fjørð.

*(Minnisbrot úr bókini: »Barn undir krígnum«.)*





*Frá ferð við Smirli í 1941*



*Smiril á veg til Havnar*